HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# PhD-undanverkætlan um collagen og gelatin úr føroyskari ráværu

Á granskingarkjarnanum fyri evnafrøði og lívtøkni er eitt 1/2 ára starv í samband við eina PhD-undanverkætlan leyst at søkja. Arbeiðsstaður er Heilsufrøðiliga Starvsstovan. Undanverkætlanin fer fram í tøttum samstarvi við føroyska fiskivinnu.

Endamálið við PhD-undanverkætlanini er at leggja lunnar undir føroyskan førleika í almennari proteinevnafrøði og serliga collagen-evnafrøði. Í fyrsta umfari er málið at fáa fram vitan um fiska-collagen og gelatin úr føroyskari ráværu. Miðið er at fáa greiði á fylgjandi spurningum:

1. Hvør ráværa er atkomulig og hvørji krøv verða sett til hana.
2. Hvørjir vøruútdráttir kunnu framleiðast úr teimum ymisku ráværunum.
3. Hvør framleiðir fiska-collagen og gelatin.
4. Hvørjir eru marknaðirnir fyri teir ymisku collagen- og gelatin-úrdráttirnar.
5. Hvørjir eru keypararnir og hvørji krøv seta teir t.d. til avtalur og skjalfesting.

Ætlanin er, at viðkomandi, sum fer í holt við undan-verkætlanina eisini heldur fram við sjálvari PhD-verkætlanini, ið vanliga tekur 3 ár. PhD-verkætlanin fer fram her á landi eins og á útlendskum universiteti við serkunnleika í collagen/gelatin evnafrøði.

Umsøkjarar skulu hava prógv í viðkomandi fakøki frá universiteti. Tey, ið eru ávegis við at gera kandidatuppgávu, eru eisini vælkomin at søkja.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

Meiri fæst av vita um verkætlanina við at venda sær til granskingarleiðaran, Hóraldur Joensen, á teldupostadressuni: horaldurj@hfs.fo ella á 356487.

Umsóknarfreistin er 15. mars 2005. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), viðmælum o. ø. skulu sendast í 4 eintøkum til:

**Granskingarkjarnin í evnafrøði og lívtøkni,**
Att.: Hóraldur Joensen
C/o Heilsufrøðiliga Starvsstovan
V. U. Hammershaimbsgøta 11
FO 100 Tórshavn
Føroyar

FØROYA LANDSSTÝRI

**Almanna- og heilsumálaráðið**

# Løgfrøðingur og Fíggjarfulltrúi

**Tvey størv eru leys at søkja í Almanna- og heilsumálaráðnum til setan skjótast til ber.**

**1 starv sum løgfrøðingur á Fyrisitingardeildini - og 1 starv sum fíggjarfulltrúi á Fíggjardeildini.**

**Serligt um størvini:**
**Sum løgfrøðingur** verða uppgávur tínar: at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir, at svara fyrispurningum frá Løgtinginum og at tulka lógir og reglur fyri Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir ráðnum.
Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi lógar- og kunngerðarsmíði bæði á bústaðar-, almanna- og heilsuøkinum. Eitt nú er nýggj føroysk forsorgarlóg ávegis, leigulóg skal tilevnast fyri fyrstu ferð í Føroyum, og psykiatrilóg skal eisini gerast.

**Serlig førleikakrøv:**
Tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv. Løgfrøðiligar starvsroyndir eru ein fyrimunur.

**Sum fíggjarfulltrúi** verða uppgávur tínar: at ansa eftir, og hava umsjón við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands, at ráðgeva stovnsleiðslum um fíggjarviðurskifti, umframt at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Almanna- og heilsumálaráðið sum heild.

Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi fíggjarstýringini í Almanna- og heilsumálaráðnum. Talan er fyrst og fremst um, at ansa eftir útreiðslunum til serviðgerð uttanlands, sum hesi seinastu árini er økt munandi. Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í samband við at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

**Serlig førleikakrøv:**
Tú ert cand. polit., cand. oecon. ella cand. scient. pol., ella hevur aðra viðkomandi útbúgving. Tú hevur góðan kunnleika til teldur, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum.

**Felags fyri størvini er:**
Tey eru áhugaverd og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við hini starvsfólkini í ráðnum. Størvini eru sjálvstøðug, og góðir møguleikar eru fyri førleikamenning.

**Førleikakrøv:**
Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur.
Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálaráðið**
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. mars 2005. Nærri fæst at vita um starvið sum løgfrøðingur við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, og um starvið sum fíggjarfulltrúi við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, tlf. nr. 30 40 50 ella teldupost: ahr@ahr.fo

*Almanna- og heilsumálaráðiðu msitur almannamál, heilsumál. javnstøðumál og bústaðarmál. Íløtuni starvast 32 fólk í ráðnum. Uppgávan hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er at ráðgeva landsstýrismonnum, at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur og at veita stovnum undir ráðnum ráð og vegleiðing. Sí meira á www.ahr.fo*








Sosialurin Sosialurin i